# Harry  Potter eigur bestseljaralistan

Tær fimm Harry Potter bøkurnar, sum higartil eru útkomnar, liggja allar ovarlaga á bestseljaralistunum fyri børn. Nýggja bókin økir søluna av hinum fýra, sum longu eru komnar út, og forlagið hevur góðar dagar



BØKUR

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Søgan um Harry Potter tykist ongan enda at taka.

Viðurkendi bestseljara-listin hjá The New York Times vísir, at als einki kann sammetast við metstóru undirtøkuna, sum bøkurnar hjá J.K. Rowling um lítla gandakallin við arrinum á pannuni hava fingið.

Á listanum yvir mest seldu bøkurnar við harðari permu, sum hava selt mest, liggja fimm titlar um Harry Potter millum tær fyrstu seks barnabøkurnar. Fimm bøkur eru komnar út um Harry Potter, so tað er mest sum gandur.

Ovast liggur nýggjasta bókin »Harry Potter and the Order of Pheonix«, sum enn ikki er komin á føroyskum. Hon var eisini nummar eitt í síðstu viku og hevur ligið tíggju vikur á hittlistanum. Tað vil siga síðan, hon kom út. Harry Potter og fangin úr Azkaban er nummar tvey og hevur ligið 177 vikur á listanum, og síðan koma hinar slag í slag. Á fimta plássið kemur ein bók sníkjandi, ið kallast »Artemis Fowl: The eterenity Code«, men á sætta plássi liggur aftur Harry Potter og kamarið við loynidómum.

Á listanum yvir bøkur við bleytari permu er sama skilið. Ovast liggur Harry Potter og eldbikarið og næstu tvær bøkurnar eru eisini um Harry Potter, og á sætta plássið kemur hann afturíaftur.

Forlagið Bloomsbury kann sjálvandi bara fegnast um góðu undirtøkuna, tí rithøvundurin J.K. Rowling hevur syrgt fyri, at næstu árini hjá forlagnum vera gylt.

Bloomsbury hevur longu staðfest, at tvær bøkur afturat koma um Harry Potter, og at hildið verður fram at gera filmir til bøkurnar. Samstundis viðgongur forlagið, at seinasta bókin »Harry Potter and the Order of Phoenix« hevur økt søluna av teimum undanfarnu bókunum.

Bókin seldi 1,77 milliónir eintøk longu fysta dagin, sum var næstan fimm ferðir so nógv sum fjórða bókin seldi, og hevur sum nevnt ligið ovast á bestseljaralistanum síðani. Bloomsbury kann fegnast um, at partabrøvini hava fingið tvífalt virði seinastu tólv mánaðirnar og eru áttafaldað síðstu fimm árini.

Bergur Rasmussen kýtir seg í løtuni við at umseta seinastu bókina til føroyskt, og hon kemur væntandi út til jóla.

# Fimm bøkur til børn og ung

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fimm bøkur. Smábarnabøkurnar Suttan hjá Peri og Potturin hjá Peri eftir *Barbro Lindgren* og *Evu Eriksson,* mynda- og spælibókina Húsið hjá Malju eftir *Lucy Cousins,* myndabókina Hvussu víða røkkur Álvur! eftir *Gunillu Bergström,* og ungdómsbókina Tú, tú & tú eftir *Per Nilsson.*

Suttan hjá Peri og Potturin hjá Peri eru fittar, lítlar bøkur til tey smæstu. Onnur søgan er um lítla




Per, sum elskar suttuna hjá sær mest av øllum. Hana vil hann eiga, og eingin skal taka hana frá honum.

Hin søgan er um, tá ið Per er vorðin so stórur, at tíðin er komin at læra seg at sita á pottinum. Men tað tímir Per ikki. Men kanska vovvurin tímir?

Niels J. Thomsen týddi, og Hestprent stóð fyri prentgerðini. Bøkurnar eru 26 síður í litum og kosta kr. 38 hvør.

### Húsið hjá Malju

Fyri einum góðum ári síðan gav Bókadeildin út




*Bóndagarðin hjá Malju.* Henda bókin gjørdist ógvuliga væl umtókt, og varð útseld eftir stuttari tíð.

Børnum um allan heim dámar so væl Malju, og teimum fer heilt vist eisini at dáma húsið hjá Malju. Tá ið tú letur bókina upp og setur hana á borðið, verður hon til húsið hjá Malju við køki, baðirúmi og sovikamari. Í hvørjum rúmi er eitt ark við smálutum at trýsta út og spæla við, okkurt at toga í, hurðar at lata upp og nógv annað. Her er eisini ein Malju pappírsdukka, ið kann røra armarnar, ein fótur at seta hana á og klæði at lata hana í. Litfagurt søguhefti er eisini lagt hjá. Í heftinum læra børnini um gerandisdagin hjá Malju, og tað gevur íblástur til at spæla við Malju.

Við tað at so nógvir smálutir eru, er bókin ikki hóskandi fyri børn, ið eru yngri enn trý ár. Húsið hjá Malju kostar kr. 148 í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentgerðini.

### Hvussu víða røkkur Álvur!




Ein bók um Álv til tey eitt sindur eldri! Tá ið børn eru 6-7 ára gomul kemur tann stóri spurningurin: Hvat er ein menniskja? Hvussu víða røkkur lagið á okkum, okkara gerðir og hugskot? Soleiðis hugsar Álvur á sín egna sniðfundiga hátt.

Teksturin er fullur í rímum og hugskotum at spæla sær við  og so er bara at halda fram sjálvur.

Hvussu víða røkkur Álvur! er myndabók við teksti. *Niels J. Thomsen* týddi, og Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin er 31 síður í litum og kostar kr. 75.

### Tú, tú & tú

Himmalin er bláur og sólin skínur, tað er leygardagur og fyrsti summardagur. Í grøna grasinum í lundini liggja trý fólk opin. Ein er í hvítum klæðum, ein í svørtum, og tann triði hevur skitnar føtur. Tvey teirra hava als einki hár, blonku skallar teirra bleiktra í sólini.




Tað eru Anon, Zarah og Nils, sum liggja har. Anon er tólv ára gamal, Zarah er seytjan og Nils er tjúgu. Fyri nøkrum vikum síðani kendu tey ikki hvør annan. Men teirra lív vavdust inn í hvørt annað, í einum meldri av lívi og deyða og kærleika og hati og longsli. Nú liggja tey her í lundini, við rygginum ímóti jørðini og andlitinum móti summarsólini. Tey liva, øll trý.

Tú, tú & tú er spennandi ungdómsbók um kærleika, men eisini um happing og tað at tora at vera tann, tú veruliga ert.

Hetta er fjórða ungdómsbókin eftir Per Nilsson, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út. Áður eru komnar *Hjartans frygd, Gorpur krunkar* og *Anarkai*.

Jákup í Skemmuni hevur týtt allar.

Tú, tú & tú er 279 síður, heft við klaffum. Bókin kostar kr. 140.





*Berghild Gullaksen, tannarøktari í Klaksvík, hevur útvegað sær flytibara útgerð til tannarøkt. Hetta ger, at hon kann fara út til fólk, sum á ein ella annan hátt ikki kunnu fara til tannlæknan, kortini kunnu fáa teirra tenn kannaðar*

# Flytibar tannarøkt

Berghild Gullaksen, tannarøktari í Klaksvík, hevur útvegað sær útgerð, sum ger, at hon kann fara út til fólk, sum á ein ella annan hátt ikki kunnu koma til tannlækna. Enn er hon ikki rættuliga komin í gongd, tí hon er í fulltíðarstarvi hjá skúlatannlæknanum, men hon hevur fingið nakrar áheitanir gjøgnum summarið

Tannarøkt
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Hvør kennir ikki henda serliga luktin, tá ein kemur inn til ein tannlækna. Summi ræðast tannlæknan og kunnu ikki fordraga henda luktin. Onnur vita bara, at soleiðis luktar tað hjá tannlæknanum, og tað má ein taka við viðgerðini. Men so eru tað eisini mong, sum kanska fegin vildu sloppið til tannlæknan, men av eini ella aðrari orsøk ikki kunnu. Hjá hesum er nú hjálp á veg. Og hesi kunnu í fyrstu atløgu fáa sínar tenn kannaðar heima við hús.

Berghild Gullaksen úr Klaksvík hevur starvast sum tannarøktari í 17 ár. Næstan alla tíðina hjá skúlatannlæknanum. Men hon er nú farin undir ein øðrvísi hátt at røkta tenninar hjá teimum, sum á ein ella annan hátt ikki sleppa til tannlækna.

Hon hevur av sínum eintingum keypt sær flytibara útgerð til at kanna, reinsa og pussa tenn. Tað sær júst út sum eitt tannlæknaborð við amboðum, sum ein kennir aftur. Bara tað, at tað stendur á einum stativi við hjólum undir. Í kjallaranum í heiminum hevur Berghild innrættað sær eitt høli, har hon vaskar øll amboð og hevur allar hentleikar, sum ein tannarøktari hevur tørv á.

Hon sigur, at hetta serliga er ætlað eldri fólki, sum kanska eru illagongd og øðrum, sum ikki sleppa so lættliga út um dagarnar. Eisini má hetta sigast at vera gott til ellis- og røktarheim, har Berghild kundi farið til stovnin og so kanna tenninar hjá teimum eldru.

– Tað eru alt fleiri og fleiri eldri fólk, sum framvegis hava teirra egnu tenn, og eg haldi, at tað er av alstórum týdningi, at tey kunnu varðveita sínar tenn so longi sum tilber, sigur Berghild.

Hon hevur lisið um hesa flytibara tannarøktina, og hon fekk so hugskotið at royna tað.

– Nú havi eg arbeitt í sama stað so at siga í 17 ár, so um eg skal royna nakað annað, so skal tað verða nú, sigur hon smílandi.

Reinar tenn eru vælvera

Berghild vísir eisini á, at reinar tenn eru vælvera.

– Eldri fólk hava ofta trupulleikar frammanundan við øðrum sjúkum, so tað hevði verið eitt pluss fyri tey, at havt reinar og góðar tenn, sigur hon.

Eldri fólk taka eisini nógvan heilivág, og hann er ikki altíð so góður fyri tenninar. Og hartil hoyrir ein ofta eldri fólk klaga um, at tey gerast so turr í munninum av heiliváginum. Og tað hevur Berghild eisini nakað fyri.

Sum sagt so er hon ikki komin í gongd av álvara enn, tí hon hevur eitt fulltíðarstarv við síðuna av, so hon sigur, at hon tekur tað, sum tað kemur. Men hon ásannar tó, at hon má gera eitt sindur við hetta, um hon skal fáa nakrar fastar avtalur.

– Um hetta fer at vísa seg at eydnast væl, so kann tað vera, at eg fari at umhugsa, hvussu tað verður við mínum starvi, sum eg havi í dag. Tað er eitt avbera gott arbeiðspláss, men dreymurin er nokk at fáa mína egnu klinikk, sigur Berghild.

Hon heldur ikki, at hon við eini klinikk hevði flutt seg inn á arbeiðsøkið hjá tannlæknunum.

– Um eg hevði funnið hol, so hevði eg víst teimum til ein tannlækna, og tannlæknarnir hava so øgiliga nógv at gera í dag, so eg trúgvi ikki, at tað hevði bilað nakað, sigur hon.

Góðar tenn

Í sínum dagliga starvi hjá skúlatannlæknanum fær Berghild eina góða mynd av, hvussu tað stendur til við tonnunum hjá børnum og ungum í dag. Hon greiðir frá, at fyri nøkrum árum síðani, merktu tey ein týðuligan bata í tonnunum, men í dag er gongdin við at venda aftur tann skeiva vegin – serliga hjá teimum í framhaldsdeildini.

– Vit vita sjálvandi ikki við vissu, hví so er. Men vit hava hug at geva sodavatni skuldina. Serliga síðani skrúvupropparnir komu. Nú ganga tey ungu við sodavatn allan dagin og fáa sær smakk av og á. Og sukrið legst á tenninar og verður liggjandi har, sigur hon.

Hon heldur fram, at tey ofta fáa næmingar úr framhaldsdeildini inn á klinikkina, sum hava bæði reinar og penar tenn og frískt tannkjøt, men tá tey so taka røntgenmynd, so vísir tað seg, at tey hava hol ímillum tenninar. Og tað heldur Berghild so avgjørt kann koma av sodavatni.

– Tað er í øllum førum ikki nakað, sum bendir á, at tey í framhaldsdeildini ikki busta tenninar nóg væl, sigur hon.

Berghild fæst eisini við tenninar hjá teimum allarminstu. Hon hevur í fleiri ár nú saman við Boga á Steig, skúlatannlækna, kallað foreldur inn til fund at greiða frá tonnunum og tannarøkt. Og har hava tey víst á, hvussu ómetaliga týdningarmikið tað er, at børnini læra at busta tenn, og at tey vaksnu hava eftirlit við tannbustingini tey fyrstu mongu árini av livitíðini hjá einum barni.

Henda sokallaða herferð gav úrslit fyri nøkrum árum síðani, og tey sóu týðiligar batar í tonnunum hjá smábørnunum. Men sum sagt, so er tað við at vera galið aftur hjá næmingum í framhaldsdeildini.

– Tað er ikki gott at vita, hvussu ein basir hesum trupulleikanum, tí at biðja tey gevast við at drekka sodavatn, tað fer neyvan at hjálpa. Vit biðja tey um at nýta tanntráð eisini og so busta tenninar so væl, sum gjørligt. Tað er helst ikki annað at gera, sigur Berghild Gullaksen, tannarøktari í Klaksvík.